# Bygdarráðsfundur

# Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 18.05.2020 kl. 17.30

Á fundi: Janus Thomsen
Eir J. Norðberg
Niels Olaf Eyvindsson
Gunnhild Mortensen
Rúni Thomsen
Sten Spange Larsen

Ikki møtt: Magni Bertholdsen

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Formaðurin bað um loyvi at taka eitt mál við aftrat – kemur á skrá sum mál nr. 9.

1. **Innkomið tilboð uppá fendarar/fríholt til bátahylin.**
   Tilboð frá S.J.H. Commercial Divers uppá 40 stk. stór fríholt á kr. 1.195,00 – íalt kr. 47.800,00.
   **Vega- og havnanevndin 18.05.2020:**
   Nevndin mælir til at taka av tilboðnum frá S.J.H.
   **Fíggjarnevndin 14.05.2020:**
   Einmælt samtykt at mæla til at taka av tilboðnum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælunum hjá nevndunum.

2. **Uppskot til avtalu um tyrvingarpláss í Sandvíkshaganum.**
   Avtalan fevnir um umleið 7.000 m2 av matr. nr. 518 í Sandvík, ið verður nýtt sum tyrvingarpláss.
   **Tekniska nevnd 22.04.2020:**
   Nevndin mælir til at góðtaka uppskotið til avtalu.
   **Fíggjarnevndin 14.05.2020:**
   Einmælt samtykt at mæla til at at taka undir við uppskotinum til avtalu.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt.

   Janus Thomsen luttók ikki í viðgerðini av næsta máli.

3. **Uppskot til avtalu um leigu av lendi matr. nr. 87r, Hvalba.**
   Uppskot til avtalu um leigu av umleið 20 m2, har vitin stendur.
   **Vega- og havnanevnd 18.05.2020:**
   Nevndin er samd um taka undir við uppskoti til avtalu.

**Fíggjarnevndin 14.05.2020:**
Einmælt samtykt at mæla til at taka undir við uppskotinum til avtalu.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt.

4. **Skriv frá borgara viðvíkjandi trupulleika av vatni.**
Gjørt verður vart við, at vatn rennur inn á teirra grundøki vestan av parkeringsplássinum hjá kommununi. Umboð frá kommununi hava verið á staðnum, trupulleikin kann loysast við, at ein kantur verður stoyptur framvið, so vatnið verður ført oman í veitina framvið vegnum.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fáa trupulleikan loystan samsvarandi hesum.

5. **Skriv frá dagstovnaleiðaranum viðv. almennu gøtuni.**
Dagstovnaleiðarin kemur við umbøn um, at almenna gøtan, sum gongur gjøgnum spæliøkið á dagstovninum, verður stongd av fyri almennari gjøgnumgongd, tí portrini verða ikki afturlatin.
**Trivnaðarnevndin 12.05.2020:**
Nevndin hevur verið á staðnum og er samd um, hvar gøtan kann leggjast fyri at órógva minst møguligt. Mælt verður til at fara í gongd við at leggja gøtuna uttan um dagstovnin sambært uppskoti hjá nevndini.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

6. **Starvslýsing dagstovnurin Brosið.**
Til viðgerðar uppskot til starvslýsing, har søkt verður eftir námsfrøðingum, hjálparfólkum, stuðlum og avloysarum til setan 1. august 2020 og 1 ár fram.
**Trivnaðarnevndin 12.05.2020:**
Nevndin hevur umrøtt hetta – verður tikið upp á bygdarráðsfundinum 18.05.2020.
**Fíggjarnevndin 14.05.2020:**
Einmælt samtykt at mæla til at taka undir við starvslýsingini.
**Avgerð:**
Einmælt samtykt at taka undir við seinnu starvslýsingini, dagfest 18.05.2020.

7. **Lýsing skúlabarnaflutningur innan kommunu.**
Sum samtykt varð á bygdarráðsfundi tann 27.04.2020, skal skúlabarnakoyringin innan kommunu bjóðast út av nýggjum.
**Trivnaðarnevndin 12.05.2020:**
Nevndin hevur gjørt uppskot til lýsing.
**Avgerð:**
Samtykt varð einmælt at taka undir við lýsingini.

8. **<u>Umsókn um loyvi at seta frystibingju á havnarlagnum</u>.**
   Skriv innkomið vegna brúkarar av egningarskúrinum á Hamranesi um loyvi at seta eina 40 fót frystibingju á økið vestanfyri egningarskúrin.
   **Vega- og havnanevnd 18.05.2020:**
   Nevndin mælir til at geva loyvi til at seta bingjuna, soleiðis at hon ikki órógvar virksemið á flakavirkinum.
   **Avgerð:**
   Samtykt varð einmælt at fylgja tilmælinum hjá Vega- og havnanevndini.

9. **<u>Navnakapping til nýggja bátahylin</u>.**
   **Vega- og havnanevndin 18.05.2020:**
   Nevndin hevur viðgjørt hetta og gjørt eina lýsing til uppskot um navn til nýggja bátahylin. Nevndin mælir til, at vinnandi uppskotið fær eina virðisløn á kr. 3.000,-.
   **Avgerð:**
   Einmælt samtykt at fylgja tilmælinum hjá nevndini.

10. **<u>Ikki almenn mál</u>.**

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 19.15

| | | |
|---|---|---|
| Janus Thomsen | Eir J. Norðberg | Niels Olaf Eyvindsson |
| Gunnhild Mortensen | Rúni Thomsen | Sten Spange Larsen |